# KUNNINGARSKRIV 2024



# SØRVÁGS KOMMUNA

## Góðu borgarar í Sørvágs kommunu!

Eg skal byrja við at ynskja øllum eitt gott og eydnuberandi nýggjár!

Nýtt kommunustýri tók við á nýggjárinum. Nøkur eru nýggj, og 3 eru afturvald. Skal hervið takka fráfarandi kommunustýrislimum fyri gott samstarv tey síðstu 4 árini.

Hetta kunningarskrivið gevur mær høvið, sum borgarstjóri, at taka saman um farna valskeið. Eg ynski eisini her at nýta høvið at takka fyri álitið, sum mær var víst til valið 12. nov. 2024, og fegnist um, at eg fekk høvi, at halda fram í borgarstjórastarvinum næstu 4 árini.

Á síðstu síðunum í skrivinum leggja vit høvuðsyvirlit yvir fíggjarætlanina fyri 2025 og høvuðsyvirlit yvir roknskapin fyri 2023.

## FÍGGJARÆTLANIN 2024

Sambært fíggjarætlanini fyri 2024 var ætlanin at gera íløgur fyri 31.1 mió. kr. innan hesi øki:

| | |
|---|---|
| Almanna- og heilsumál: | 1.450.000,- |
| Børn og ung: | 7.000.000,- |
| Undirvísing: | 3.790.000,- |
| Mentan og frítíð: | 8.790.000,- |
| Teknisk mál: | 9.656.000,- |
| Kommunal virki: | 500.000,- |

Innan almanna- og heilsumál er peningurin brúktur til heimið á Sýnini og Ivanshús. Innan økið børn og ung er peningurin brúktur upp á at útbyggja Alvalon. Innan undirvísing er peningurin brúktur upp á spæliplláss í skúlagarðinum og nýggja tekju á høllini. Innan mentan og frítíð er peningurin brúktur til fjølmiðlahús, skýlið og nýggjan vøll á Dungasandi. Teknisku málini fevna um m.a. kloakk, víðkan av ídnaðarøkunum og asfalt.

## HVAT ER SO FRAMT Í VERKI

Síðan eldraøkið bleiv lagt út til kommunurnar at umsita 1. januar 2015, hava stórar íløgur verið gjørdar á Sýnini. Í 2023 var kjallarin gjørdur liðugur, og í 2024 eru øll vesini hjá búfólkunum gjørd av nýggjum. Hetta eru bæði starvsfólk og búfólk sera glað fyri. Enn er nakað eftir at gera, áðrenn vit endaliga eru komin á mál.

Kommunan hevur gjørt avtalu við Vága kommunu um at keypa seg inn í Ivanshús, so báðar kommunurnar eiga bæði heimini í felag. Kostnaðurin hjá Sørvágs kommunu fyri Ivanshús er 874.000 kr. Hetta verður avgreitt í 2025.



## BØRN OG UNG:
## EITT SAMT BYGDARÁÐ TIKIÐ STØÐU TIL AT ÚTBYGGJA BARNAGARÐIN.

Sørvágs kommuna og ArtiCon hava gjørt sáttmála at útbyggja Alvalon í Sørvági. Nýggi bygningurin verður 24 metrar langur og 10 metrar breiður. Bygningurin verður í tveimum hæddum við lofti. Niðasta hæddin er til umsiting, har skrivstovur og fundarhøli mynda hæddina. Á miðhæddini eru tvær barnagarðsstovur við umklæðing, bólkarúmi, hvílirúmi, motorikrúmi, sansarúmi og vátrúmun. Á loftinum er hugsavningarstað til børnini.

Ímillum verandi og nýggja bygningin verður høvuðsinngongd, ið virkar sum bindlið til allar stovurnar á stovninum.

Niðasta hæddin verður úr betong bæði veggir og dekk. Ovara hæddin og tekjan verða gjørd sum timburelementir í høllini hjá ArtiCon á Sundi.

Arbeiðið er byrjað, jørðarbeiðið er liðugt, og í skrivandi stund verða formar settir upp. Ætlaði bygningurin skal avhendast í september 2025.

Kostnaðurin fyri hesa verkætlanina er 22.800.000 mill. kr.

## SKÚLIN

Skúlin hevur verið dagførdur síðstu nógvu árini. Í ár er einki undantak.

Í 2023 varð arbeiðið at umvæla tekjuna á fimleikahøllini bjóðað út, tað varð Fuglark Arkitektar, sum stóð fyri útbjóðingini.

Eftir at staðfest varð, at bert eitt tilboð kom inn, varð avgjørt at taka av tilboðnum frá CJ Bygg, sum í 2024 hevur arbeitt við uppgávuni. Fyrsti partur av arbeiðinum er um at verða liðugt.

Fyrst í hesum árinum verður støða tikin til, hvussu og nær tað arbeiðið, sum eftir er, skal gerast.

## SPÆLIPLÁSS Í SKÚLAGARÐINUM

Leingi er tað í væl skal verða. Endiliga fingu børnini sítt ynski uppfylt við at gera eitt spælipláss í skúlagarðinum. Hetta hevur verið uppá tal í nógv ár. Vónandi verður hetta við til at økja um trivnaðin hjá børnunum í skúlanum. Spæliplássið er eisini ætlað børnum eftir skúlatíð.




## MYKINES

Í 2023 bleiv skúlin í Mykinesi umvældur, og verður hann í dag útleigaður í summarhálvuni til hagarpartarnar í sambandi við ferðavinnuna.




Fyri at betra um umstøðurnar sjóvegis, bæði fyri ferðandi og farm, hevur Landsverk stoypt og breiðkað lendingina. Hettar er eisini við til at betra um trygdina hjá ferðafólkinum.



## FERÐAVINNAN

Visit Vágar er ein menningardepil, sum virkar undir bæði Sørvágs kommunu og Vága kommunu. Høvuðsendamálið er at menna ferðavinnuna í Vágum á ein góðan og burðardyggan hátt. Seinastu tíðina er arbeitt við at seta eitt lokalt ferðavinnunetverk á stovn, soleiðis at ferðavinnuaktørar í Vágum í felag kunnu menna ferðavinnuna í kommununi. Eisini verður tað arbeitt við at menna cruiseferðavinnuna í Vágum, og verður hetta gjørt í samstarv við tey lokalu. Somuleiðis arbeiðir Visit Vágar við skelting, menning og sparring, og eru altíð klár at hjálpa lokalum aktørum og svara spurningum.

## SPILLIVATNSSKIPANIN

Nógvur peningur er settur av til dagføring av spillivatnsætlanini síðstu fýra árini.

Í mai 2023 samtykti bygdaráðið at leggja nýggja leiðing niðan eftir Varðagøtu.Hetta ger, at meginparturin av húsunum eystan/vestanfyri Varðagøtu er lagdur í kloakkskipanina, sum verður pumpað út á sjógv. Peningur er settur av á fíggjarætlanina fyri 2025 til framhaldandi arbeiðið.

Arbeitt hevur eisini verið at fingið miðbygdina í kloakkskipanina, hetta arbeiðið hevur gingið væl, men nakað er eftir, áðrenn komið er á mál.

Í sambandi við at kommunan hevur ognartikið lendið inni í bátahylinum og hevur gjørt serstaka byggisamtykt fyri neystaøkið, sum enn ikki endaliga er komin upp á pláss, varð avgerð tikin um at leggja vatn og kloakk til øll neystini og at samskipa hetta soleiðis, at sethúsini, sum standa framvið Bakkavegnum, verða løgd í somu kloakkskipan.

Hendan kloakkskipanin er løgd út á sjógv út ímóti Klivum.

| Kloakk | | | |
|---|---|---|---|
| **Roknskapur** | **Rakstur** | **Íløgur** | **Samanlagt** |
| **2020** | **190.000** | **1.030.000** | **1.220.000** |
| **2021** | **137.000** | **633.000** | **770.000** |
| **2022** | **193.000** | **737.000** | **930.000** |
| **2023** | **215.000** | **2.832.000** | **3.047.000** |
| **Tils.** | **735.000** | **5.232.000** | **5.967.000** |
| **Miðal pr. ár.** | **183.750** | **1.308.000** | **1.491.750** |
| **Fíggjarætlan 2024** | **243.000** | **1.600.000** | **1.843.000** |

## UMHVØRVISPLÁSSIÐ (BINGJUPLÁSSIÐ)

Tað er ókeypis at sleppa av við burturkast frá húsarhaldinum á umhvørvisplássinum. Heitt verður á fólk um at skilja burturkastið væl, ikki at seta rusk uttanfyri plássið og um at leiga bingju frá IRF, tá tey hava nógv burturkast t.d. í sambandi við bygging, umbygging ella annað. Verður komið við dekkum á umhvørvisplássið, so skulu tey IKKI vera á felgunum.

Virki, handlar og aðrar fyritøkur hava onga atgongd til umhvørvisplássið, men eiga í staðin av hava egna avtalu við IRF um burturbeining av vinnuburturkasti.

Eru ivamál, so hevur IRF ein góða og kunnandi heimasíðu: http://irf.fo/

### Opið er soleiðis: týsdag kl.16-18, fríggjadag kl. 16-18 og leygardag kl. 16-18

Seinasta 3 árini eru fleiri vegastrekki í Sørvági dagførd og asfalterað, vegastrekki frá kaiini og heim í bygdina er í tveimum umførum dagførd, fyrst frá kaiini og heim til Hugo, har umfatandi tekniskar leiðingar eru dagførdar, parkeringsbásar eru gjørdir, og vegurin er asfalteraður.

Vegastrekkið frá Hugo og heim í bygdina er nýliga asfalterað, og gongubreyt gjørd í niðaru síðu. So nú er Niðarivegur ein tryggari farleið hjá fólki at ganga, og fer hettar eisini at gera, at tunga ferðslan til og av kaiini ikki kemur ov nær laðaða garðinum.




Á vegastrekkinum frá Blindtarminum og oman í bygdina er umfatandi laðingararbeiðið gjørt, og prýðir tað sanniliga bygdina, eisini er bygdin asfalterað.




Niðari partur av Varðagøtu er nýliga asfalteraður, og nýggj gongubreyt gjørd, hildið verður fram við arbeiðinum at gera ovara part av Varðagøtu lidnan í januar/februar mánaði.

## DUNGASANDUR

Sørvágur hevur tann framíhjárætt at sleppa at hýsa Betri deildini í fótbólti í oynni, hetta setur stór krøv til umstøðurnar á Dungasandi, sum skulu vera á einum høgum støði, hetta eru krøv, sum verða sett av FSF. Sørvágs kommuna hevur seinastu árini tikið stig til munandi dagføringar av økinum á Dungasandi.

Í ár varð nýggjur graslíkisvøllur lagdur á vøllin á Dungasandi, Sørvágs kommuna tók av tilboðnum frá Føroya Møblasølu.






07 Vestur húsið, sum undanfarin ár er dagført til virksemi á hægsta støði, er nú eisini dagført til at kunna hýsa miðlunum, nú eru góðir klivar tøkir til allar miðlar.

Seinasta stóra átakið á Dungasandi er at gera skýlið til áskoðarar, hetta arbeiðið verður vónandi liðugt áðrenn kappingarbyrjan 2025. Tað er fyrrverandi formaðurin í 07 Vestur, sum hevur teknað allar dagføtingar og útbyggingar á Dungasandi



Alt økið við Dungasand er nú prýðiliga dagført við nýggjum vegum og parkeringsøki, sum eisini er asfalterað. Tá várið kemur, fara vit at síggja plantur og runnar, sum eru gróðursett við Dungasand.





## SJÓSAVN- OG MENTARNARHÚS

Gongd er komin á byggingina av Sjósavns- og mentanarhúsinum í Vágum við staðsetingini á uppfyllingini við bátahylin í Sørvági.

Byggifelagið J&K. Petersen hevur byggingina undir hond, og eftir tíðarætlanini væntast bygningurin at standa liðugur um eitt ár.

Skipið ”Marna”, ið er ein serligur og sjónligur partur av ætlanini, væntast at kom til Sørvágs miðjan januar 2025 og kemur at standa úti við bátahylin, har hann verður klárgjørdur.

Ætlanin er, at ein kunningarfundur verður hildin tíðliga í vár, so fólk fáa eina nágreiniliga kunning um verkætlanina, og hvønn týdning hon kemur at hava fyri Sørvág, Vágar og landið annars.

Sjósavns- og mentanarhúsið í Vágum er eitt áhugafelag, ið er stovnað við tí endamálið at virka fyri at M/S Marna kann gerast ein livandi og verdugur karmur um okkara sjósøgu og mentanarliga fyritaksemi til gaman og álvara hjá ungum og gomlum.

- At lýsa okkara sjóvinnusøgu

- At vera ein mentanardepil

- at vera ein partur av ferðvinnuni

## SAVNIÐ HJÁLPIR OKKUM AT VARÐVEITA SIÐSØGULIGA ARVIN:

Sjóvinnusøgan í orð, myndum og framsýning í livandi umhvørvi.

Týdningurin fyri samfelagið við træbátinum í miðdeplinum frá byrjan til dagin í dag.

Føroyingar millum fremstu innan fiski- og sjóvinnu.

Vetrarhálvan við framsýning, framløgum, kvøldsetum í breiðum týdningini at lýsa:

- og økja tilvitanina millum ung og gomul og hvønn týdning sjógvurin enn hevur fyri
- okkara lívsvirðir í vinnu- og mentanarhøpi bæði á sjógvi og landi.
- siglingarsøguna frá árabáti til nýmótast skipaflota
- týdningin, bátar og skip høvdu og enn hava fyri samfelagið
- sjóvinnuna og týdningin hon hevði og enn hevur fyri okkara lívsføri á hesum oyggjum

## HVØR KANN GERA NÝTSLU AV BYGNINGINUM:

Øll skulu eiga og kunna gera brúk av húsinum alt árið undir skipaðum umstøðum m.a. við framsýningum o.ø. til:

- Ferðavinnuna

- Skúlaklassar

- Arbeiðspláss

- Kvøldsetur

- Listaframsýningar av ymiskum slag

- Tónleikaframførslur

- Fyrilestrar

- Skipað virksemi við onnur feløg



## ATLANTIC AIRWAYS

Føroyska flogfelagið húsast eisini í okkara kommunu. Teirra virksemi avspeglast eisini í inntøkunum hjá kommununum í Vágum. Starvsfólkatalið liggur um 250 ársverk.

Samlaða ferðafólkatalið við rutuflogførum felagsins í 2024 var umleið 370.000 ferðafólk. Áhugin fyri Føroyum sum ferðamáli er framvegis stórur, og tí verður væntað, at ferðafólkatalið næstu árini so spakuliga fer at økjast, serstakliga ferðafólk úr øðrum londum.

Í 2024 vóru flogfør og tyrlur samanlagt 11.259 tímar á flogi. Tvey av flogførunum eru A320neo flogfør, ið eru tey mest orkusparandi av sínum slag, ið hava í minsta lagi 15% lægri oljunýtslu og $CO_2$ útlát enn onnur Airbus flogfør av somu stødd.

Í 2024 hevur Atlantic Airways bjóðað ferðafólki beinleiðis rutuflúgving til og úr Føroyum til 13 ymisk ferðamál: Keypmannahavn, Billund, Aalborg, Oslo, Reykjavík, Edinburgh, London, París, Barcelona, Mallorka, Gran Canaria, Tenerife og New York. Harumframt vóru beinleiðis flogtúrar úr Føroyum til Berlin í januar 2024 í sambandi við, at føroyska manslandsliðið í hondbólti fyri fyrstu ferð í søguni luttók í einari EM-kapping. Flogið hevur verið regluliga fleiri ferðir um dagin millum Føroyar og Keypmannahavn, umframt at regluligt flogsamband er til Billund, Reykjavíkar og Oslo alt árið, til París frá mars til oktober, til Edinburgh frá mars til desember, til Aalborg í tíðarskeiðnum mai-oktober, umframt í sambandi við páska- og jólafrítíðina og til London í tíðarskeiðnum juni til august. Harumframt hevur verið flogið beinleiðis til Barcelona og Mallorka í háárstíð, til New York í september – oktober, til Tenerife í oktober og til Gran Canaria á hávetri. Harumframt hevur Atlantic Airways eisini leiguflúgving úr Danmark til ymisk ferðamál sunnanfyri.

Tyrluvirksemið í 2024 hevur verið á leið á sama stigi sum í 2023. Við støði í 10 ára sáttmála við Føroya Landsstýri, røkja tyrlurnar innanoyggja flúgving til útoyggjar og eru tøkar til leiting og bjarging (SAR) alt samdøgrið allar dagar í árinum.

Komandi ár letur nýggi altjóða miðdepilin fyri flogvenjingar, Atlantic Airways Aviation Academy, upp við framkomnum AW139 tyrlusimulatori og Airbus A320 flúgvisimulatori. Simulatorvirksemi fer at gerast ein nýggj vinna, ið fer at styrkja um búskaparligu støðu felagsins.

## VIRKIÐ HJÁ HIDDENFJORD Í SØRVÁGI

Á virkinum hjá Hiddenfjord starvast í dag umleið 120 starvsfólk. Í 2024 er laksur tikin av alibrúkunum hjá Hiddenfjord í Vestmanna, Hestfirði, Miðvági, Sørvági og Suðuri í Bug. Samlaða nøgdin av kruvdum laksi verður umleið 17.500 tons – áleið tað sama sum í 2023.

Umleið 40% av laksinum verður skorin til flak, meðan restin verður seldur sum kruvdur, reinsaður laksur. Størstu marknaðirnir hjá Hiddenfjord í ár hava verið USA og Evropa.

Í ár eru fýra ár liðin, síðan Hiddenfjord gavst við at flyta laks loftvegis. Hetta hevur spart umhvørvinum meira enn 300.000 tons av CO2, og eru vit sera errin av hesum. Sjóvegis flutningur av feskum laksi til USA gongur væl. Hvørja viku verður stór nøgd av laksi send við skipi úr Havnini sunnukvøld til Portland, Maine, í USA. Flutningurin yvirum Atlantshav tekur níggju dagar. Eftir at laksurin er komin fram, verður hann fluttur við bili til marknaðir um alt USA. Hvørja viku fara umleið tríggir lastbilar við laksi til tann kræsna sushimarknaðin heilt yviri í Kalifornia. Hetta er sera hugaligt og prógvar góða góðsku á feska laksinum.

Útbyggingar eru í gongd á virkinum, og væntandi verður framhaldandi bygt út í 2025.

## VÁGA FLOGHAVN

Føroyskir myndugleikar yvirtóku Vága Floghavn í 2007 og varð partafelagið, P/F Vága Floghavn, stovnað í hesum sambandi at standa fyri virkseminum. Síðani tá er rættiliga nógv hent. Flogbreytin er longd og nýggj farstøð og tænastubygningar bygd, umstøðurnar at taka ímóti flogførum eru bøttar munandi, eins og parkeringsplássið til bilar er fleirfaldað.




Hetta merkir tó ikki, at slottið er vunnið. Í 2007 lá ferðslan um 200.000 ferðandi árliga, og í ár fer hon at táttast upp ímóti 450.000. Vøksturin hevur við sær øktan tørv á útbyggingum, bæði fyri at bøta enn meira um umstøðurnar at handfara flogferðslu, men sanniliga eisini at betra um hjá viðskiftafólkum, sum vitja floghavnina.

Fyri at brynja seg til framtíðina fór Vága Floghavn á sumri í 2019 undir eina heildarætlan. Henda varð liðug á vári í 2020, og tað kendist ikki sørt speiskt, at hon varð handað floghavnini á grækarismessu, júst sama dag sum løgmaður boðaði frá, at nú fór samfelagið niður í ferð. Hóast støðuna við umfarssótt varð avgerð tikin um at arbeiða víðari við ætlanini, og byggiskrá varð tí gjørd grundað á heildarætlanina.

Ætlanin byggir á væntað virksemi komandi tjúgu árini og útgreinar tørvin á teimum átøkum, sum eru neyðug, skal floghavnin vera til reiðar til komandi tíðina. Í heildarætlanini verður væntað, at ferðafólkatalið um Vága Floghavn í tíðarskeiðnum verður gott og væl tvífaldað, soleiðis at tað fer upp um eina millión næstu tjúgu árini.




Skjøtil er settur á fleiri av verkætlanunum, sum liggja í heildarætlanini, og týðiliga sæst, at floghavnin er í stórari menning. Eitt stórarbeiði, sum er komið væl áleiðis, er útbyggingin av parkeringsøkinum og byggibúgving av nýggjum øki at byggja hangarir á. Stórur tørvur er á hesum, tí P-økið er tíðum fult, og hjá Atlantic Airways er verandi hangar ov lítil. Nýggju flogførini fáast rætt og slætt ikki inn.

Hóast tað einans eru tíggju ár síðani, at verandi farstøð varð bygd og tikin í nýtslu, so er eisini hon vorðin ov trong. Hon varð í síni tíð bygd til 400.000 ferðandi árliga, og tað eru vit farin upp um. Umframt hetta varð hon bygd til eitt rættiliga øðrvísi ferðslumynstur, tí tá vóru flogførini helvtina til støddar av teimum, sum nýtt verða í dag.

Tað er tí átrokandi, at útbygging av farstøðini verður sett á skrá. Vága Floghavn hevur tikið stig til eina verkætlanarkapping um ráðgevarauppgávuna í sambandi við at byggja nýggja farstøð. Ætlanin er, at nýggja farstøðin skal byggjast saman við verandi kørmum. Henda kapping skal vera liðug í mai komandi ár, og spennandi verður at síggja, hvussu ymisku toymini mæla til at loysa uppgávuna.

Verandi farstøð er millum 3.000 og 4.000 $m^2$ til støddar, men sambært serfrøðini er neyðugt við millum 13.000 og 14.000 $m^2$, um rúmd skal vera fyri at avgreiða eina millión ferðandi árliga. Samstundis er tørvur á níggju standplássum til flogfør, sum eru nóg rúmsátt, til at flogfør, sum eru av Airbus A321 stødd, kunnu verða avgreidd. Floghavnin hevur sum er fimm standpláss í nøktandi stødd.

Umframt hetta eru nógvar aðrar avleiddar verkætlanir, sum samstundis er neyðugar at fremja.

Samanumtikið er tí talan um rættiliga stórar útbyggingar, sum tørvur er á, um Vága Floghavn skal brynja seg til komandi árini. Tað, sum miðað verður eftir, er tí ein floghavn, sum fer at síggja rættiliga nógv øðrvísi út, tá ætlanirnar eru førdar út í lívið.



## BYGDARÁÐSVAL 2024

Týsdagin 12. november 2024 var aftur farið til valborðið at velja sjey umboð at stýra kommununi. 16 fólk á tveimum listum bjóðaðu seg fram. Úrslitið av bygdaráðsvalinum var, at fimm menn og tvær kvinnur vórðu vald í nýggja kommunustýrið:

**Listi A:** Eyð Ellingsgaard 164 atkvøður, Jón Joensen 87 atkvøður, Helena Heðinsdóttir Guttesen 66 atkvøður, Tóki Joensen 64 atkvøður, Hans Kàri Hansen 60 atkvøður og Elias Davidsen 37 atkvøður.

**Listi B:** Hugin Skaalum 78 atkvøður.

Bygdaráðið skipaði seg við Eyð Ellingsgaard sum borgarstjóra og Jón Joensen sum varaborgarstjóra.

## NEVNDIRNAR ERU HESAR:

**Fíggjarnevnd:** Eyð Ellingsgaard, Jón Joensen og Helena Heðinsdóttir Guttesen

**Tekniska nevnd:** Hans Kári Hansen, Jón Joensen og Elias Davidsen

**Trivnaðarnevnd:** Helena Heðinsdóttir Guttesen, Tóki Joensen og Hans Kári Hansen

**Vinnunevnd:** Tóki Joensen, Jón Joensen og Hugin Skaalum

**Havnanevnd:** Elias Davidsen, Tóki Joensen og Helena H. Guttesen.

# BYGDARÁÐSFUNDIR 2025

Bygdaráðið hevur ásett føstu bygdaráðsfundirnar fyri 2025. Fundirnir verða kl. 17:00 í fundarhølinum á kommunuskrivstovuni niðanfyri nevndu dagar.

| | |
|---|---|
| Mikukvøldið | 29. januar |
| Mikukvøldið | 26. februar |
| Mikukvøldið | 26. mars |
| Mikukvøldið | 30. apríl |
| Mikukvøldið | 28. mai |
| Mikukvøldið | 25. juni |
| Mikukvøldið | 27. august |
| Mikukvøldið | 24. september |
| Mikukvøldið | 29. oktober |
| Mikukvøldið | 26. november |

Mál, sum skulu verða viðgjørd á bygdaráðsfundi, skulu vera kommununi í hendi í seinasta lagi 14 dagar fyri fundin.

Eykafundir ella broytingar í skránni verða lýstir á svørtu talvu á kommunuskrivstovuni og á heimasíðuni hjá Sørvágs kommunu.




P/f skattur 2020 – 2024



## FÍGGJARSTØÐAN

Nettoskuldin hjá Sørvágs kommunu við ársbyrjan 2024 var 3.8 mió. kr.

Tað er torført at siga neyvt, hvussu stór nettoskuldin er við árslok 2024, tí roknskapurin fyri árið verður ikki gjørdur fyrr enn í mai 2025. Leysliga mett, verður nettoskuldin uml. 14.2 mió. kr.

| **Nettoskuldin í mió. krónum pr. 1. jan.** | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Ár | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 | 2024 |
| Mió. Kr. | 25,7 | 19,8 | 14,1 | 18,7 | 12,2 | 2,1 | 3,8 |

| **Fólkatalið í kommununi pr. 1. jan.** | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Ár | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 | 2024 |
| | 1.172 | 1.202 | 1.237 | 1.218 | 1.238 | 1.241 | 1.227 |

## FÍGGJARÆTLANIN 2025

Sørvágs bygdaráð samtykti á bygdaráðsfundinum mikukvøldið hin. 27. november fíggjarætlanina fyri 2025

Hesi eru høvuðstølini:

| | |
|---|---|
| Mett skattainntøka: | 57.735 |
| Mettur P/F skattur: | 4.000 |
| Leiga | 764 |
| Tøkugjald | 800 |
| Skattur av eftirlønarinngjøldum: | 13.315 |
| Flyting vegna DIS, FAS og frádráttir | 3.968 |
| Avgjøld | 16 |
| | 80.598 |
| Lán: | 22.398 |
| Tilsamans: | 102.996 |

| | |
|---|---|
| Rakstur: | 71.137 |
| Afturgjald av skuld | 3.355 |
| Íløgur | 28.504 |
| Fíggjarætlanin javnvigar við: | 102.996 |

Skattaprosentið verður 21,0% og barnafrádrátturin kr. 7.500 Fíggjarætlanin fyri 2025 javnvigar við góðum 102.996 mió. kr. Inntøkurnar eru mettar til kr. 80.598. Av hesum er persónsskatturin kr. 57.735 og partafelagsskatturin kr. 4.000.000. Restin er afturbering frá landinum til eldraøkið. Raksturin er mettur til kr. 71.137.000, og kr. 28.504.000 eru settar av til íløgur. Íløgurnar verða fíggjaðar við 6.1 mió. í rakstrinum, meðan restin, slakar 22.398 mió. verða fíggjaðar við lántøku. Kommunan fer í 2025 at rinda slakar 3.355 mió. í avdráttum av láninum.

## ÍLØGUR 2025

Sambært FÆ 2025 ætlar Sørvágs kommuna at gera íløgur fyri 28.504 mió. kr. Peningurin fer í høvuðsheitum til útbygging av Alvalon.

Peningur er eisini settur av til m.a. umvælingararbeiðið av Ivanshúsi. Framhaldandi dagføring av spillivatnsskipanini. Tvs. at íløgurnar eru innan hesi øki: Almanna- og heilsumál: 704.000,- Børn og ung: 19.600.000,- Undirvísing: 2.200.000,- Mentan og frítíð: 1.700.000,- Teknisk mál: 2.000.000,- Kommunal virki: 2.300.000,-

**Høvuðsyvirlit yvir fíggjarætlanina fyri 2025**

| Túsund kr. | | Rakstrarætlan Útreiðslur | Rakstrarætlan Inntøkur | Løgu-ætlan |
|---|---|---|---|---|
| **§ 1.** | **Kommunal fyrisiting** | **4.681** | **-** | **-** |
| | 11. Felagsútreiðslur | 4.681 | - | - |
| **§ 2.** | **Almanna- og heilsumál** | **21.831** | **764** | **704** |
| | 20. Heilsumál | 2.075 | - | - |
| | 21. Almannamál | 19.756 | 764 | 704 |
| **§ 3.** | **Børn og ung** | **15.737** | **-** | **19.600** |
| | 26. Barnaansing | 15.737 | - | 19.600 |
| **§ 4.** | **Undirvísing** | **5.690** | **-** | **2.200** |
| | 23. Útbúgving og gransking | 5.690 | - | 2.200 |
| **§ 5.** | **Mentan og frítíð** | **3.527** | **-** | **1.700** |
| | 23. Útbúgving og gransking | 1.014 | - | - |
| | 24. Mentan | 2.513 | - | 1.700 |
| **§ 6.** | **Teknisk mál** | **10.765** | **-** | **2.000** |
| | 11. Felagsútreiðslur | 3.284 | - | 800 |
| | 22. Íbúðarmál | - | - | -1.000 |
| | 24. Mentan | 1.168 | - | - |
| | 30. Umhvørvi | 1.054 | - | 1.000 |
| | 37. Handil og vinna annars | - | - | -1.400 |
| | 38. Samferðsla og samskifti | 5.259 | - | 2.600 |
| **§ 7.** | **Kommunal virki** | **5.719** | **-** | **2.300** |
| | 30. Umhvørvi | 3.215 | - | - |
| | 31. Tilbúgving | 808 | - | - |
| | 37. Handil og vinna annars | 26 | - | - |
| | 38. Samferðsla og samskifti | 1.670 | - | 2.300 |
| **Tilsamans** | | **67.950** | **764** | **28.504** |
| § 20. | 22. Íbúðarmál | 1.250 | - | - |
| § 20. | 50. Rentur | 1.937 | - | - |
| § 20. | 52. Skattir og avgjøld | - | 79.834 | - |
| Tilsamans | | 71.138 | 80.598 | 28.504 |
| Yvirskot | | - | 9.461 | - |
| **Rakstrar-, løgu- og útlánsætlan RLÚ** | | **-** | **-19.043** | **-** |
| § 25. | 62. Afturgjald av skuld | 3.355 | - | **-** |
| **Bruttokassaúrslit** | | **3.355** | **-19.043** | **-22.398** |
| Fígging: | | | | |
| § 25. | 64. Útvegan av gjaldføri | - | 22.398 | **-** |
| Fígging íalt: | | - | 22.398 | 22.398 |
| **Samanlagt** | | **3.355** | **3.355** | **-** |

**Høvuðsyvirlit yvir játtanarroknskapin fyri 23**

| | | | Játtan | | | Roknskapur | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | **Rakstur og útlán** | | | **Rakstur og útlán** | | |
| Túsund kr. | | | **Útreiðslur** | **Inntøkur** | **Løgur** | **Útreiðslur** | **Inntøkur** | **Løgur** |
| **§ 1.** | **Kommunal fyrisiting** | | **4.969** | **0** | **0** | **4.708** | **0** | **0** |
| | 11. | Felagsútreiðslur | 4.969 | 0 | - | 4.708 | - | - |
| **§ 2.** | **Almanna- og heilsumál** | | **20.468** | **764** | **90** | **20.294** | **764** | **45** |
| | 20. | Heilsumál | 2.022 | - | - | 1.959 | - | - |
| | 21. | Almannamál | 18.446 | 764 | 90 | 18.335 | 764 | 45 |
| **§ 3.** | **Børn og ung** | | **13.279** | **-** | **1.000** | **13.121** | **-** | **356** |
| | 26. | Barnaansing | 13.279 | - | 1.000 | 13.121 | - | 356 |
| **§ 4.** | **Undirvísing** | | **5.416** | **-** | **1.320** | **5.401** | **-** | **649** |
| | 23. | Útbúgving og gransking | 5.416 | - | 1.320 | 5.401 | - | 649 |
| **§ 5.** | **Mentan og frítíð** | | **3.041** | **-** | **8.113** | **3.053** | **-** | **5.807** |
| | 23. | Útbúgving og gransking | 728 | - | - | 766 | - | - |
| | 24. | Mentan | 2.312 | - | 8.113 | 2.287 | - | 5.807 |
| **§ 6.** | **Teknisk mál** | | **8.707** | **-** | **8.811** | **7.921** | **-** | **7.660** |
| | 11. | Felagsútreiðslur | 2.689 | - | 700 | 2.154 | - | 354 |
| | 22. | Íbúðarmál | - | - | 725 | - | - | 892 |
| | 24. | Mentan | 682 | - | - | 491 | - | - |
| | 30. | Umhvørvi | 1.037 | - | 2.800 | 1.024 | - | 2.832 |
| | 37. | Handil og vinna annars | - | - | 0 | - | - | -925 |
| | 38. | Samferðsla og samskifti | 4.299 | - | 4.586 | 4.252 | - | 4.509 |
| **§ 7.** | **Kommunal virki** | | **5.967** | **-** | **1.400** | **5.017** | **-** | **642** |
| | 30. | Umhvørvi | 3.216 | - | - | 2.708 | - | - |
| | 31. | Tilbúgving | 574 | - | - | 404 | - | - |
| | 37. | Handil og vinna annars | 0 | - | - | 26 | - | - |
| | 38. | Samferðsla og samskifti | 2.177 | - | 1.400 | 1.880 | - | 642 |
| **Tilsamans** | | | **61.848** | **764** | **20.733** | **59.515** | **764** | **15.158** |
| § 20. | 22. | Íbúðarmál | 635 | - | - | 1.170 | - | - |
| § 20. | 35. | Sjóvinna | - | - | - | - | - | - |
| § 20. | 50. | Rentur | 160 | - | - | 471 | 0 | - |
| § 20. | 52. | Skattir og avgjøld | - | 73.203 | - | - | 73.852 | - |
| Tilsamans | | | 62.643 | 73.967 | 20.733 | 61.156 | 74.616 | 15.158 |
| Yvirskot | | | - | 11.324 | - | - | 13.460 | - |
| | | | Útreiðslur | Inntøkur | Yvirskot | Útreiðslur | Inntøkur | Yvirskot |
| **Rakstrar-, løgu- og útlánsætlan RLÚ** | | | **-** | **-9.409** | **-** | **-** | **-1.698** | **-** |
| § 25. | 60. | Broytingar í "virði" og "skuld v.m." | 0 | 4.682 | - | 2.211 | 5.891 | - |
| **Nettokassaúrslit** | | | **-** | **-4.727** | **-4.727** | **2.211** | **4.192** | **1.982** |
| § 25. | 62. | Afturgjald av skuld | 2.371 | - | - | 1.982 | - | - |
| **Bruttokassaúrslit** | | | **2.371** | **-4.727** | **-7.098** | **4.192** | **4.192** | **-** |
| Fígging: | | | | | | | | |
| § 25. | 64. | Útvegan av gjaldføri | 0 | 7.098 | - | 0 | 0 | - |
| Fígging íalt: | | | 0 | 7.098 | 7.098 | 0 | 0 | 0 |
| **Samanlagt** | | | **2.371** | **2.371** | **-** | **4.192** | **4.192** | **-** |